## Búmerkjakapping

# UNGA TJÓÐVELDIÐ

Unga Tjóðveldið skrivar við hesum búmerkjakapping út. Øll eru vælkomin at taka lut.

Uppskot skulu vera okkum í hendi innan 9. august 2003. Vinnarin verður kosin á landsfundi Unga Tjóðveldisins 16. august 2003. Limir felagsins kjósa vinnaran.

Vit taka ímóti uppskotum í einumhvørjum hami. Tað verður seg í teldusniði, pappírssniði ella rúnakelvi.

Trý tey bestu uppskotini vinna skapara sínum eina flogu frá 200 og eina frá Jógvani Jóni. Vinnarin fær eina peningagávu áljóðandi kr. 1.500,-. Tann, ið gerst nummar tvey, fær eina peningagávu áljóðandi kr. 500,-. Møguliga verða fleiri vinningar at fáa.

Vilt tú vita meir? Vitja heimasíðu okkara

**www.ut.fo**

Teldutøk uppskot skulu sendast til: ut@ut.fo

Onnur snið skulu sendast til

Unga Tjóðveldið
Postrúm 143
110 Tórshavn

## Skipari til MF »Norrönu«



Søkt verður eftir skipara til Norrönu at byrja sum skjótast.

Viðkomandi skal hava hollar royndir sum yvirstýrimaður/skipari við ferðamannaskipum (yvir 10000 BT) umframt øll prógv/skeið, ið krevjast til ferðamannaskip í altjóða sigling.

Umsóknir saman við avriti av prógvum og CV skulu stílast til stjórnina og vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 10. juli 2003.

**P/F SMYRIL LINE**
Postboks 370 · FO-110 Tórshavn

## Tannlæknastovan hjá Steintór Larsen

Vit eru í summarfrí frá 7. juli til og við 13. august.

**Steintór Larsen, tannlækni**

**Almannastovan**

## Almannastovan á kunningarferð kring landið

Almannastovan hevur framt umfatandi innanhýsis broytingar. Hetta vil Almannastovan kunna sínar samstarvsfelagar um. Almannastovan hevur í hesum sambandi skipað fyri einum stórum kunningarátaki kring alt landið.

Í mai mánaði í ár bjóðaði Almannastovan samstarvsfelagum sínum til kunningarfundir. Hesir fundir vórðu vegna verkfall avlýstir, men verða tiknir upp aftur í august í ár.

Fundirnir verða hildnir í hesi røð:

- Fyrrapartin hósdagin 14. august fyri Norðoyggjar
- Seinnapartin hósdagin 14. august fyri Eysturoynna
- Fyrrapartin fríggjadagin 15. august fyri Sandoynna, Skúvoynna, Hest og Koltur
- Seinnapartin fríggjadagin 15. august fyri Vágarnar, Norðurstreym og Mykines
- Seinnapartin hósdagin 21. august fyri Suðuroynna
- Seinnapartin fríggjadagin 22. august fyri Suðurstreym og Nólsoynna

Við vón um góða undirtøku!

**Almannastovan**

## Til sølu



BMW 320i í sera góðum standi. Ikki innfluttur sum brúktur.

Ongan skaða havt.

Sera lagalig fígging.

**Bilfríðkan**
**tlf. 317300 ella 217300**

## Urtagarðsarbeiði

Vit gera alt urtagarðsarbeiði.

**Fa. Urtagarðsrøkt**
**tlf. 32 71 31 ella 28 39 53**

## Pedagogar

**til Bústovnin á Rúnarvegi og Sambýli á Líknargøtu**

Innan Almannaráðið og stovnar undir tí, við fyribils tænastu á Bústovninum og Sambýlunum í Runavík, eru tvey pedagogstørv leys at søkja til setan 1. sept. 2003 ella eftir nærri avtalu.

Størvini vera sett sum tænastumannastørv, eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag, lønt stigini 24-31 eftir lønartalvu pr. 01.03.03.

Annað starvið, ið søkt verður eftir, fær til uppgávu at arbeiða í Sambýlinum á Líknagøtu 1, hjá 3 monnum við diagnosuni autismu. Hetta arbeiðið krevur at viðkomandi umsøkjari er kropsliga og sálarliga væl fyri, er førur fyri at kunna gera kropsligt arbeiði saman við monnunum, ganga túrar, svimja, gera fimleik o.a.

Hitt fólkið fær til uppgávu at arbeiða við teimum 6 menningartarnaðu íbúgvunum á Bústovninum á Rúnarvegi 6. Hesi krevja hjálp og vegleiðing í øllum tí, sum tey hava tørv á.

Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna, skiftandi vaktir og annaðhvørt vikuskiftið. Starvsøkið er allur stovnurin, og tann setti kann rokna við at fáa aðrar uppgávur aðrastaðni í skipanini, um tørvur gerst á tí.

Nærri fæst at vita um størvini frá Oddfríðu Højgaard, leiðara á tlf. 226121.

Umsóknir við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu vera stovninum í hendi innan 11. juli 2003.

**Bústovnurin á Rúnarvegi 6**
att: Leiðarin
FO-620 Runavík

:: HJÁLP - ARBEIÐI SØKIST ::

Fryntligur ungur maður úr Sveis, 25 ár, og pápi at einum smádrongi í Føroyum, søkir arbeiði á Streymoynni, Eysturoynni ella Vágunum.
Havi innivist í Havn.

- **Havi handilsskúlaútbúgving við royndum**
- **Royndir í bókhaldi, fyrisiting og EDV**
- **Kønur í enskum og týskum, og dugi nakað av føroyskum**
- **Ongar trupulleikar við skiftandi arbeiðstíðum ella yvirtíðum**
- **Eri álitandi og arbeiðsamur**

Kunnu tit hjálpa ? ...ynskja tit fleiri upplýsingar?...
Vitja mína heimasíðu **http://andras.meier.fo**

## Handilshøli ynskist

Vit leita eftir einum handilshøli í Eysturoynni, støðd 50–100 m², til friðarligt virksemi. Best um tað er frá Søldarfirði og út eftir, aðra staðni hevur eisini áhuga.
Ein góður møguleiki fyri eyka inntøku.

Skriva til
**Sosialurin**
Box 76
110 Tórshavn
Bill.mrk. 1614-5

# Les føroyska lívfrøði í Føroyum

Nýggj lesandi verða upptikin á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum í summar. Tá byrjar eitt nýtt hold á lív-/evnafrøðiligu støðisútbúgvingini, eins og framhaldslestur verður til BS í lívfrøði.

Upptøkutreyt til lív-/evnafrøðiligu støðisútbúgvingina er støddfrøðiligt studentsprógv við B-stigi í lærugreinunum evnafrøði, støddfrøði og alisfrøði. Fólk við øðrum tilsvarandi fortreytum kunnu verða tikin upp eftir nærri meting. Tað ber eisini til at melda seg til einstakar av lærugreinunum.

Umsóknarblað og meiri upplýsingar fáast við at venda sær til Náttúruvísindadeildina, tel. 352550, ella við at hyggja á heimasíðuna: www.setur.fo

Umsóknir skulu stílast til:

Náttúruvísindadeildin
Boks 2109
FO 165 Argir

Umsóknarfreistin er 18. juli 2003 (longd freist). Byrjað verður 25. august 2003.

## Til sølu

**Scania 143-450 trekkjari** 6x2 »við dumparalast«
**Scania 113-380 dumparar** 8x4 »við dumparalast«
**Scania 143-400 dumpari** 6x4
**Blokkvognur** (niðurbygdur)

Ring og hoyr nærri.

**Tlf. 421123**

## Hugnadagurin í Dali 21. juni 2003



Góðu dalbingar. Ein stór tøkk til tykkum, sum gjørdur dagin so sera hugnaligan og minnisríkan fyri okkum øll. Bygdin flaggskrýdd og hvørt hús stóð opið, fylt við blíðskapi. Búgvið morgunmatarborð og seinni ein góðan døgurða við undirhaldi, harmoniku, sangi og dansi. Vit kendu okkum øll, sum hoyrdu vit til millum tykkum í Dali.

Tøkk.

**Útisetar**

## Maskinmeistari

Søkt verður eftir maskinmeistara til nýggja virkið hjá P/F Salmon Proteins á Eiði.

**Arbeiðsuppgávur**
At hava ábyrgd fyri dagliga rakstrinum, sum í høvuðsheitum er at ansa eftir dampketli, trýstkókara, reinsiskipan, pumpum og hartil hoyrandi útbúnaði. Viðlíkahald av rakstrartólum.

**Førleikakrøv**
Maskinmeistaraútbúgving. Ketilpassaraprógv er ein fyrimunur. Kunnleika til telduskipanir, serliga skipanir til stýring av rakstrartólum.
Tað er umráðandi, at tann, ið settur verður, kann arbeiða sjálvstøðugt, og er førur fyri at leggja arbeiði til rættis sjálvur.

**Setanartreytir**
Løn og arbeiðstíð sambært avtalu.

**Umsókn**
Umsókn saman við upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera P/F Salmon Proteins, Postboks 9, 470 Eiði í hendi seinast 17. juli 2003.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jógvan Emil Nielsen á tlf. 423478 ella 210270.

P/F Salmon Proteins er eitt nýtt felag, ið skal savnað saman slógv frá alivinnuni í Føroyum og hagreiða hetta á nýggja virkinum á Eiði.



STARVSFÓLK TIL FLYKRUNA Í SMS

SØKT VERÐUR EFTIR STARVSFÓLKIÐ TIL FLYKRUNA Í SMS AT BYRJA BEINAVEGIN.

STARVIÐ ER HÁLVTÍÐARSTARV VIÐ SKIFTANDI VAKTUM. FLYKRAN SELUR UNDIRKLÆÐIR OG KVINNUKLÆÐIR.

**UMSÓKNIR SKULU SENDAST TIL:**
FLYKRUNA
POSTBOKS 1047
110 TÓRSHAVN

MØGULIGIR SPURNINGAR UM STARVIÐ FÁAST Á TEL. 31 55 65 ELLA VIÐ AT STØKKA INN Á GÓLVIÐ Í HANDLINUM.

*Flykran*
SMS 31 55 65

**VINNUMÁLARÁÐIÐ**

## Avloysarastarv sum skrivari til Vinnumálaráðið

Vegna starvsfólk í barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir skrivara til Vinnumálaráðið at byrja skjótast tilber og í minsta lagi 6 mánaðir fram.

**Arbeiði fevnir um:**
- Alt fyrifallandi skrivstovuarbeiði, herundir
  - at rættlesa útgangandi skjøl
  - ymisk málsavgreiðsla
  - telefonavgreiðsla
  - journal og postavgreiðsla
  - aðrar fyrifallandi uppgávur

**Vit hugsa okkum, at tú hevur:**
- skrivstovuútbúgving ella aðra hóskandi útbúgving
- hollan kunnleika til føroyskt, danskt og enskt
- kunnleika til EDv á brúkarastøði
- góð samstarvsevni

**Vit bjóða:**
Eitt fjølbroytt og spennandi starv, sum tú sjálv/sjálvur verður við til at skapa, til tíðir strævið, men samstundis sera áhugavert og mennandi við góðum skeið- og eftirútbúgvingarmøguleikum.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Setanarøkið fevnir um Vinnumálaráðiðog stovnar undir tí umfram Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, viðmælum o.ø. verða sendar til:

**Vinnumálaráðið**
Postrúm 377
110 Tórshavn

og mugu vera ráðnum í hendi í seinasta lagi 21. juli 2003.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Vinnumálaráðið telefon 356060.

Søkt verður eftir kokkalærlingi

Nærri upplýsingar fáast við at ringja tel 21 34 30

MARCO POLO
Tlf 31 34 30
www.marcopolo.fo

Sosialurin 341800

**Visti tú ikki tað? Sosialurin**